Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Odmar Færø 65 ár

Í dag, mánadagin 5. desember, verður Odmar Færø yvirlækni á barnadeildini á Landssjúkrahúsinum 65 ár.

Odmar er ættaður av Toftum. Foreldrini vóru Elsa og Oluf Færø. Hon var úr Fuglafirði, og hann var av Toftum. Tey fingu fýra børn, og tey eru Poul, sum var føddur í 1938, Odmar í 1940, Eyðfinn í 1946 og Lissan í 1948.

Poul, Lissan og Eyðfinn búgva í Klaksvík, og Odmar býr í Havnini.

Odmar gekk tvey ár í preliminer og tvey ár á studentaskeið á VBV, har Føroya Studentaskúli tá helt til. Hann fekk húgvuna á høvdið í 1960.



Eftir skúlaárini í høvuðsstaðnum arbeiddi Odmar hjá partafelagnum D. P. Højgaard, og hann royndi eisini sjólívið, áðrenn hann fór niður at lesa. Í 1961 fór Odmar til Århus at lesa medisin. Hann var liðugur við lesturin í 1968. Eftir at hava arbeitt í tvey ár á Landssjúkrahúsinum gekk leiðin til Keypmannahavnar, har Odmar fór at útbúgva seg í pediatri ella til barnalækna.

Útbúgvingin var fyri tað mesta á Rískissjúkrahúsinum og eisini partvís á amtssjúkrahúsinum í Glostrup. Síðstu tíðina í Keypmannahavn var Odmar fyrsti hjálparlækni og okkurt skifti avloysari sum yvirlækni á Ríkissjúkrahúsinum.

Dreymurin var altíð at flyta aftur til Føroya. Men tá í tíðini mettu myndugleikarnir ikki, at tað var tørvur á serlækna í pediatri. Tá ið Odmar í 1980 flutti til Føroya, gjørdist hann skúlalækni. Nakrar tímar um vikuna var hann konsulentur á Landssjúkrahúsinum. Í 1984 var yvirlæknastarv í pediatri normerað, og ivaleyst var tað so sjálvsagt, at Odmar, sum var fyrsti føroyski læknin í hesi sergreinini, fekk starvið.

Síðani hevur Odmar verið yvirlækni á Landssjúkrahúsinum. Har er hann sera væl umtóktur. Starvsfelagarnir siga um hann, at hann er dugnaligur, lagaligur og sjáldsama umsorgsfullur. Hetta er komið børnunum, foreldrunum og ikki minst starvsfólkunum til góða.

Í 1994 og í 1995 arbeiddi Odmar í Saudi Arabia, og síðani hevur hann fleiri ferðir verið í Umanak í Grønlandi og arbeitt. At hann fór til Grønlands at arbeiða komst av, at konan í tvey ár var lærari í Umanak.

Odmar giftist í 1963 við Jonnu fødd Johannesen og ættað úr Klaksvík. Foreldrini hjá henni vóru Alexandra og Kaj Johannesen.

Jonna og Odmar búðu í mong ár í Albertslund. Eftir at tey vóru flutt til Føroya, bygdu tey undir Brúnni, og har búgva tey framvegis. Jonna og Odmar eiga ein son. Hann eitur Oddmar, og hann er tannlækni í Aberdeen. Oddmar er giftur við Anna Maria fødd Müller og ættað úr Havnini. Tey eiga trý børn - Odmar, Sandri og Joanna.

Odmar Færø hevur bæði roynt seg sum sangara og fótbóltsspælara.

Meðan hann gekk í studentaskúla, skipaði William Sloan, sáli, fyri, at pláta varð givin út, har Odmar spældi guitar og eitt nú sang Tá eg ein lítil drongur var, og á aðrari plátu sang hann duett saman við Sólrun Skaale av Toftum.

Lestrarárini í høvuðsstaðnum spældi Odmar við B36. Hann var fjølgávaður og kundi nýtast í verju, á miðvølli og álopi, og tað var skjótt, at hann kom á besta B36 liðið, har hann bæði í 1959 og í 1962 var við til at vinna FM heitið. Eisini eftir at Odmar var farin til Danmarkar at útbúgva seg, var hann ofta á B36 liðnum í summarfrítíðunum, og tá ið hann í tíðarskeiðum arbeiddi í Føroyum. Í 1966 var hann partur av KÍ liðnum, sum vann FM. Hetta summarið arbeiddi hann á Klaksvíkar Sjúkrahúsi. Síðani tey fluttu til Føroya hevur Odmar eitt skifti verið nevndarlimur og formaður í B36.

Odmar spældi tríggjar ferðir á fótbóltslandsliðnum. Fyrsta ferðin var í 1961, tá ið Hetland var mótstøðuliðið, og í 1968 og í 1969 spældi hann ávikavíst móti Orknoyggjunum og Hetlandi.

Føðingardagin helt Odmar fríggjadagin saman við starvsfólkunum á Barnadeildini.

J

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Marjun Skaale Dánjalsdóttir** fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum í dag klokkan 17. Jarðarferðin verður úr Berøa og út í kirkjugarðin á Nesi týsdagin kl. 13. Tey, sum vilja minnast Marjun, kunnu geva eina peningagávu til Føroya Felag Móti Krabbameini.

**Ole Johannes Olsen**, vanliga nevndur Jóannes, ættaður úr Skopun, búsitandi í Nyker á Bornholm, andaðist 5. november í Hantsholm, 39 ára gamal.

Jarðarferðin verður leygardagin 10. desember kl. 11.00 úr kapellinum í Rønne.

**Elias Ívarson,** føddur Zachariassen úr Mykinesi, búsitandi á Selfossi í Íslandi, andaðist 2. desember, 84 ára gamal

**Leivur Holm,** Tvøroyri, andaðist á Suðuroyar Sjúkrahúsi, hósdagin 1. desember, 76 ára gamal. Jarðarferðin varð úr Tvøroyrar kirkju mánadagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Leivur, kunnu lata Tvøroyrar kirkju eina gávu.

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum at kæri pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

**Elias Ìvarson**

føddur Zachariasen

úr Mykinesi, uppvaksin í Sørvági, búsitandi á Selfossi í Ìslandi, doyði 2. desember 2005, á sjúkrahúsinum í Selfossi, 84 ára gamal.

*Familjunnar vegna*

**Elsebeth Elena Eliasdóttir**

# Krúndiamantbrúdleyp í Rituvík

Í dag, mánadagin 5. desember, eru tað 65 ár síðani, at Signa og Søren Jacob Lamhauge í Rituvík giftust í Nes kirkju. Tey eru framvegis væl fyri og búgva heima.

Signa, sum er fødd 31. mars í 1920, er ættað úr Gøtu. Foreldrini vóru Petra og Jóannes Mikkelsen í Syðrugøtu. Tey fingu fýra børn, og Signa er tann einasta, sum er eftir á lívi.



*Signa og Søren Lamhauge. Gentan í miðuni er langommu- og langabbadóttirin Signa, sum fyllir 5 ár í dag*

Søren Jacob, sum er føddur 13. november í 1913, er úr Rituvík. Foreldrini vóru Rachel og Joen Magnus Lamhauge. Hann var elsti sonur Amaliu og Søren Lamhauge, sum vóru millum fyrstu niðursetufólkini í Rituvík. Tey fingu sjey børn, og umframt Søren Jacob er ein systir eftir á lívi. Hon eitur Jonny og býr inni hjá Signu og Søren Jacob. Í dag fyllir hon 79 ár.

Signa og Søren Jacob giftust inn til foreldur hansara. Seinni vóru tey húsini tikin niður, og tey bygdu dygst við síðuna av.

Signa arbeiddi í nøkur ár í Lynfrost. Men mesta av tíðini var hon heima, og tað hevur verið nóg mikið at takast við. Umframt børnini so vóru verforeldrini eisini í húsinum. Tey doyðu út frá Signu og Søren Jacob. Eisini var ein onnur systir Søren Jacob, Valentina, í húsinum. Hon fekk menigitis sum 16 ára gomul og livdi inntil hon var elligomul. Í 1992 doyði hon út frá Signu og Søren Jacob.

Søren Jacob var sjómaður øll tey yngru árini. Hann hevur áður í samrøðu í Sosialinum greitt frá sínum langa og hendingarríka lívi. Eitt nú sigldi hann undir krígnum við William Martin, sum Niclas Højgaard í Rituvík førdi. Tá ið Fiskimannafelagið fyri stuttum skipaði fyri samkomu fyri teimum, ið sigldu undir krígnum, var Søren Jacob kanska elsti luttakarin, og tá greiddi hann hugtakandi frá um kavbátar og minur. Í FF blaðnum sigur hann serliga frá tí ferðini, tá ið teir norðanfyri Langanes vórðu álopnir, og tá ið hann hevði ábyrgdina av at senda rakettir við veiri upp í loft fyri at verja seg móti flogálopunum.

Tá ið kirkjan í Rituvík varð bygt í fimmti árunum, var Søren Jacob í bygginevndini, og hann var við til at byggja hana. Eftir at hon var liðug í 1955, var hann til skips aftur, men síðani 1958 hevur hann verið heimamaður. Søren Jacob smíðaði hús saman við beiggjunum Jógvani og Esmari, sum báðir vóru timburmenn.

Signa og Søren Jacob hava verið friðarlig fólk. Tey hava verið millum álitini í kirkjuni í bygdini. Søren Jacob var í mong ár limur í kirkjuráðnum og formaður eisini, og tey hava bæði verið millum teirra, sum hava havt orðið í missiónshúsinum.

Signa og Søren Jacob Lamhauge eiga fimm børn. Tey eru Rosa, sum er fødd í 1942, Jeffri í 1943, Joen Magnus í 1946, Meinhard í 1948 og Petra í 1953. Rosa og Jeffri búgva í Runavík, Joen Magnus býr í Havnini, og Meinhard og Petra búgva í Rituvík. Barnabørn og eisini fleiri í næsta ættarliðnum eru komin afturat.

Sunnudagin var familjan í kirkju í Rituvík, og so varð krúndiamantbrúdleypið hildið á Runavíkar Sjómansheimi seinnapartin. Har var opið hús, og 170 fólk stukku inn á gólvið at heilsa upp á tey bæði, sum nú hava livað saman í 65 ár, og harvið hava livað saman í longri skeið, enn tað unnast teimum flestu.

J